tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 10.06.2026 kl. 16:30
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, ~~Anita Vibergsdóttir~~, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir: Tóki Justinussen

Ikki møtt: Anita Vibergsdóttir

Onnur: Teitur Rasmussen, Georg Muller

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 58/26 | 26/00217-1 | Tvøroyrar kommuna -roknskapur 2025 |
| 59/26 | 25/00222-2 | Vøllurin við Stórá - Nýggj LED-ljós rundan um vøllin |
| 60/26 | 26/00210-1 | Snaran - Umvælingar og tillagingar |
| 61/26 | 25/00257-2 | Dráttur til nýggja kapppróðrarneystið hjá FSR |
| **Til kunningar** | | |
| | | |

**Kunning til býráðið**
Kristin Michelsen, borgarstjóri, setur fundin og kunnar um, at Anita Vibergsdóttir hevur fráboðað, at henni berst frá at møta til býráðsfundin í dag, 10. Juni 2026.

Hon hevur heitt á Tóka Justinussen, ið er fyrsti (1.) valdi varalimur á lista T, Felagslistan, til kommunustýrisvalið 12. november 2024, um at møta í staðin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Tóka Justinussen eru loknar.

Tóki hevur frammanundan havt sæti í býráðnum hesa setuna og tekur sæti til fundin uttan avgreiðslu.

**Skrá og viðmerkingar til hesa:**
Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna – Ongin viðmerking til skránna.

**Til støðutakan**

**58/26**
**26/00217-1 Tvøroyrar kommuna -roknskapur 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 83/26 |
| 2 Býráðið | 10.06.2026 | 58/26 |

**Málslýsing: Kommunstjórin 04.06.2026**

Við hesum verður ársroknskapurin fyri Tvøroyrar kommunu fyri fíggjarárið 2025 lagdur fyri fíggjarnevndina og býráðið til viðgerðar og góðkenningar.

**Lógargrundarlag**

Sambært § 46 í kommunustýrislógini skal kommunustýrið í sambandi við góðkenning av ársroknskapinum taka støðu til, um verandi grannskoðari skal halda fram, ella um annar grannskoðari skal veljast.

Sambært § 53, stk. 2, nr. 1, skal grannskoðaði ársroknskapurin verða landsstýrinum í hendi innan 1. juni eftir endað fíggjarár.

**Fíggjarligar avleiðingar**

Málið hevur ikki í sær sjálvum nýggjar fíggjarligar avleiðingar, men snýr seg um góðkenning av ársroknskapinum fyri 2025.

**Frágreiðing**

Ársroknskapurin fyri 2025 er gjørdur í samsvari við galdandi kommunala lóggávu og kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommunanna.

## Grannskoðanin

Grannskoðarin, JANUAR Løggilt grannskoðanarvirki P/F, hevur grannskoðað ársroknskapin fyri 2025. Grannskoðarin metir, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu kommununnar pr. 31. desember 2025 og av úrslitinum av virksemi kommununnar í roknskaparárinum. Somuleiðis metir grannskoðarin, at mannagongdir og innaneftirlit stuðla undir, at tær disponeringar, ið eru umfataðar av roknskapinum, eru í samsvari við játtanir, avgerðir hjá býráðnum, galdandi lógir og gjørdar avtalur.

Grannskoðarin hevur harumframt staðfest, at mánaðarliga innrapporteraðu tølini til Fíggjarmálaráðið samsvara við bókhaldið hjá kommununi, uttan at hetta hevur givið orsøk til viðmerkingar.

## Úrslit samanborið við fíggjarætlan

Í fíggjarætlanini fyri 2025 varð roknað við einum halli á rakstrar-, løgu- og útlánsætlanini (RLÚ) upp á -24,956 mió. kr. Endaliga úrslitið gjørdist eitt hall á -409 tkr., sum er munandi betri enn mett í fíggjarætlanini.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar vóru 92,1 mió. kr., meðan samlaðu inntøkurnar vóru 111,9 mió. kr. Rakstraravlopið áðrenn løgur og fígging var sostatt 19,8 mió. kr.

## Skattainntøkur

Samlaðu skattainntøkurnar vóru 111,9 mió. kr., samanborið við játtaðar inntøkur á 100,8 mió. kr. Hetta svarar til meirinntøkur á umleið 11,1 mió. kr.

Skattainntøkurnar býta seg soleiðis:

- Kommunuskattur: 78,2 mió. kr.
- Skattur av eftirlønarinngjøldum: 25,6 mió. kr.
- Felagsskattur: 3,5 mió. kr.
- Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir: 4,6 mió. kr.
- Tøkugjald: 51 tkr.

## Rakstur

Raksturin hevur verið støðugur gjøgnum árið. Størstu rakstrarøkini vóru:

- Almanna- og heilsumál: 37,9 mió. kr.
- Børn og ung: 16,3 mió. kr.
- Mentan og frítíð: 11,0 mió. kr.
- Kommunal fyrisiting: 11,5 mió. kr.
- Undirvísing: 8,7 mió. kr.

## Løgur

Løguútreiðslurnar vóru samlað 20,2 mió. kr. samanborið við játtaðar 31,5 mió. kr.

Størstu løgurnar í 2025 vóru:

- Umsiting og røkt av fastognum: 6,3 mió. kr.
- Vegir: 3,8 mió. kr.
- Fólkaskúlin: 3,3 mió. kr.
- Havnir og lendingar: 2,1 mió. kr.
- Barnaansing: 1,0 mió. kr.

## Fíggjarstøða

Fíggjarstøðan vísir, at samlaðu ognirnar við árslok 2025 vóru 28,3 mió. kr. samanborið við 19,6 mió. kr. árið fyri. Tøkur peningur var 19,3 mió. kr. við árslok 2025 samanborið við 9,1 mió. kr. við árslok 2024.

Langfreistaða skuldin var 57,1 mió. kr. við árslok 2025 móti 46,1 mió. kr. árið fyri. Í árinum vóru nýggj lán tikin upp fyri 14,5 mió. kr., meðan 3,4 mió. kr. vóru afturgoldin.

Nettoskuldin í mun til álíkning var við árslok umleið 33%, og kommunan hevur framvegis eina trygga fíggjarliga støðu.

## Aðrar viðmerkingar

Kommunan hevur veðhaldsskyldur gjøgnum limaskap sín í IRF og SEV. Harumframt hevur kommunan eina eftirlønarskyldu viðvíkjandi einum fyrrverandi starvsfólki. Leasingavtalur hjá kommununi vóru við árslok 2025 upp á tilsamans 299 tkr.

**Tilmæli**

Fíggjarleiðarin og kommunustjórin hava gjøgnum gingið roknskapin uttan viðmerkingar, og mæla til, at fíggjarnevndin góðtekur ársroknskapin fyri 2025 og grannskoðanarprotokollina og beinir málið í býráðið við tilmæli um at góðkenna hesi.

Harumframt skal býráðið taka støðu til val av grannskoðara sambært § 46 í kommunustýrislógini.

Roknskapur og grannskoðanarprotokoll skulu undirskrivast á býráðsfundinum.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at samtykkja roknskapin 2025 samsv. tilmælið hjá fíggjarleiðara, kommunustjóra sum fyriliggjandi, og at grannskoðarafelagi Januar heldur fram sum grannskoðanfelag. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 10. juni 2026:**
Borgarstjórin mælir til at samtykkja roknskapin 2025 samsv. tilmælið hjá fíggjarnevndini, sum fyriliggjandi, og at grannskoðanarvirki Januar heldur fram sum grannskoðaravirkið. -Einmælt samtykt.

**59/26**
**25/00222-2 Vøllurin við Stórá - Nýggj LED-ljós rundan um vøllin**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 13.05.2026 | 24/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 02.06.2026 | 78/26 |
| 3 Býráðið | 10.06.2026 | 59/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 12.01.2026**
LUMA lysteknik hevur sett seg í samband við Tvøroyrar kommunu og spurt, um kommunan er áhuga at fáa ein prís uppá nýggj ljós rundanum vøllin við Stórá. Hann var ein túr við Stórá tann 21. mei, har undirritaði og távegrandi hallarvørðurin við Stórá, Gilli Rólantsson, vóru og vístu honum umstøðurnar.

LUMA lysteknik eru eftirfylgjandi komnir við einum tilboði uppá ljós, sum kunnu monterast í gomlu mastrarnar. Talan er um 8 stk LED-ljós við levering á 250.000 kr + mvg. Hesin prísurin er tó tengdur at, um vit bíleggja við somu levering sum FC Suðuroy, sum eru í gongd við at seta nýggja ljós upp vesturi á Eiðinum.

Teir bjóða eisini 10 ára totalgaranti uppá ljósini, bæði hvat viðvíkur feilum og ljósstyrki.

Tó er tilboðið ikki við uppsetan, og má avtala tí gerast við ein veitara á staðnum at gera tað arbeiðið, sum so ber ein eyka kostnað við sær.

Ljós frá sama veitara eru sett upp rundanum vøllin hjá AB á Argjum í fjør. Eg havi sett meg í samband við Kristian Dahl, samskipara hjá AB, sum letur væl at loysnini, sum Tórshavnar kommuna hevur valt til vøllin har.

FSF hevur í fleiri ár givið stuðul til nýggjar ljósskipanir hjá fótbóltsliðum runt um í landinum. Stuðulin er tengdur av, at ljósviðurskiftini liva upp til minstukrøvini hjá FIFA. Tá er talan um íløgur fyri nakrar milliónir (hava givið stuðul upp til 650.000 kr).

Av tí, at gomlu ljósini við Stórá eru illa farin, noyðist kommunan at hugsa um at fáa tey skift innan ikki alt ov langa tíð. Seinasta vetur logaðu bara 4 ljós av 8 tað mesta av tíðini, tí hini fingu skaða av óveðrinum, sum var. Hetta gongur út yvir venjingarnar.

Tey gomlu ljósini brúka meiri streym, og er tað eisini nógvar ressursir, sum skulu brúkast til viðlíkahald. Nýggju ljósini brúka minni streym, og hava eisini eitt meiri konsentrera ljós, sum lýsir meiri niður á vøllin.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**

Nevndin verður biðin um at taka støðu til, hvat skal gerast við ljósviðurskiftini við Stórá:

- Taka av fyriliggjandi tilboðið frá LUMA lysteknik (mett endaliga at kosta 400.000-500.000 kr)
- Kanna, um onkur onnur loysn kann skaffast frá øðrum veitara, sum lýkur krøvini hjá TB í mun til nøktandi ljós til venjingar o.l.
- Kanna, hvat tað kostar við einari loysn, sum lýkur altjóða krøv.

Leggjast kann afturat, at sera fáir fótbóltsdystir verða spældir um kvøldið, tá dagsljósið ikki er nøktandi, og er tað mest undir kvøldarvenjingum um summarið og í vetrarhálvuni, at brúk er fyri, at ljósviðurskiftini eru góð nokk.

Mælt verður eisini til, at standurin á núverandi mastrum og fundamentum verður eftirkannaður.

**<u>Tekniska nevnd 13. mai 2026:</u>**
Nevndin mælir til, at standurin á verandi ljósmastrum og fundamentum má kannast. Eisini mælir nevndin til, at tekniska deild kannar møguleikan fyri at skifta gomlu ljósini út við nýggjari LED-ljós, sum kunnu nøkta tørvin hjá TB í mun til venjingar o.l. í vetrarhálvuni. Einmælt samtykt.

**<u>Fíggjarnevndin 02. juni 2026:</u>**
Einmælt tilmælið hjá Teknisku nevnd, og at játtanin verður veitt av §625, bygging og løguframleiðsla.

**<u>Býráðið 10. juni 2026:</u>**
Georg Muller møtti á fundinum og greiddi nærri frá verkætlanini. Borgarstjórin mælir til, at býráðið samtykkir tilmælið frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini um, at tekniska deild fær heimild at kanna møguleikan fyri at skifta gomlu ljósini út við nýggj LED-ljós, sum kunnu nøkta tørvin til venjing og annað virksemi í vetrarhálvuni. Mælt verður samstundis til, at kostnaðurin verður játtaður av FÆ2026, §625, sum eykajáttan. -Einmælt samtykt.

**60/26**
**26/00210-1 Snaran - Umvælingar og tillagingar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 21.05.2026 | 16/26 |
| 2 Fíggjarnevndin | 02.06.2026 | 75/26 |
| 3 Býráðið | 10.06.2026 | 60/26 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 11.05.2026**
Kommunali bygningurin, staðsettur á Miðbrekku 2, har dagtilhaldið Snaran er, treingir til ábøtur. Ein útbygningur oman ímóti vegnum, sum fyrr bleiv brúktur til inngongd, tá banki var í bygninginum, eigur at verða tikin burtur, takið niðaneftir treingir til at skiftast (gamalt asbesttak) eins og ymiskar dagføringar/umvælingar eiga at verða gjørdar innan, soleiðis at bygningurin kann fáa meiri nyttuvirði.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Trivnaðar- og umhvørisnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 21. maj 2026:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum. Nevndin mælir eisini til, at húsið verður málað uttan. Forkvinnan leggur dent á, at arbeiðið við at skifta gamla takið verður gjørt eftir galdandi forskriftum, soleiðis at vandamikil evni, s.s. asbest verða handførd á rættan hátt. Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 02. juni 2026:**
Einmælt samtykt  tilmælið hjá Trivnar- og umhvørvisnevndini og játtanin verður veitt av §625 Bygging- og løguframleiðsla sum eykajáttan -málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 10. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnar- og umhvørvisnevndini og fíggjarnevndini um at dagføra Snæruna, og at játtanin verður veitt av §625 Bygging- og løguframleiðsla sum eykajáttan.

**61/26**
**25/00257-2 Dráttur til nýggja kappróðrarneystið hjá FSR**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 18.06.2025 | 14/25 |
| 2 Býráðið | 26.06.2025 | 54/25 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 14.10.2025 | 28/25 |
| 4 Mentanarnevndin | 10.06.2026 | 67/26 |
| 5 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 84/26 |
| 6 Býráðið | 10.06.2026 | 61/26 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur fingið tilboð frá MTV um at byggja nýggjan bátadrátt til kappróðrarneystið á Hvítanesi.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kostnaðarmeting: 445.610 kr

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu- og havnanevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 18. juni 2025:**
Nevndin hevur viðgjørt innkomna byggiloyvi í samráð við limirnir í teknisku deild og umsitingini, og mælt verður til at geva byggiloyvi. Ein samd nevnd mælir eisini til at taka av fyriliggjandi tilboði frá MTV-byggivirkið uppá at byggja ein bátadrátt til FSR.

**Tekniska deild 25-06-2025:**
Býráðið verður biðið um at geva undantaksloyvi til at gera nýggjan bátadrátt til kappróðrarneystið á Hvítanesi, orsaka av, at hann fer út um økið sum er lagt út til bygging í byggisamtyktini.
Nevnast kann, at talan er ikki um at gera nýtt lendi við útfylling á sjógv, men at gera eina konstrúktión, sum kann takast sundur, um tað verður ynskt í framtíðini.
Til samanberingar sæst tað á kortal.fo, at líknandi konstruktiónir allar eru gjørdar uttan fyri økið í byggisamtyktini í Tórshavn.

**<u>Býráðið 26. juni 2025:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndini at geva frávik í byggisamtyktini, og geva byggiloyvið til nýggjan bátadrátt til kappróðrarneystið á Hvítanesi, samsv. fyriliggjandi ætlanir.

Borgarstjórin mælir til, at heimila FSR játtan á kr. 758.620,- av FÆ2025, §525 til keyp av innbúgv og til bygging av drátti, samsv. umsókn frá forkv. í FSR, Kristinu Roest, dagf. 18.06.2025. -Einmælt samtykt.

**Viðm. Tekniski leiðarin (GM) tann 13.10.2025:**
Forkvinnan í FSR, Kristina Roest, hevur biðið um fund við Vinnu- og havnanevndina fyri at greiða frá gongdini í málinum.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 14. oktober 2025:</u>**
Forkvinnan í FSR kunnaði nevndina um gongdina við kappróðrarneystinum og avbjóðingar við arbeiðinum við at gera dráttin. Nevndin í FSR hevur ynski um, at Tvøroyrar kommuna eigur dráttin, og at tekniska deild tekur sær av byggingini saman við arbeiðstakaranum.
Vinnu- og havnanevndin tekur undir við ynskinum hjá forkvinnuni í FSR.

**<u>Kommunustjórin 10.06.2026:</u>**
**Forkv. i mentanarnevndini hevur heitt á kommunustjóran, um at nevndin viðgerð játtanina til bygging av drátti til kappróðrarneystið hjá FSR, -eftir at býráðið hin 26. juni 2025 samtykti at heimila FSR stuðulsjáttan á til bygging av bátadrátti.**

MTV hevur latið hin 18. juni 2025, tilboð uppá bátadráttin á kr. 380.610,-, ið FSR hevur tikið av. Arbeiði at gera bátadráttin er framt í 2026.

***Viðmerking:*** *Tilboðið frá MTV til bygging av dráttinum var kr. 380.610,- uttan MVG. Harumframt varð upplýst, at kostnaður til stálkonstruktión og hongsl fór at koma aftrat við ávikavist umleið kr. 50.000 og kr. 15.000. Samlaða kostnaðarmetingin var sostatt umleið kr. 445.610,- uttan MVG.*

Tað eydnaðist ikki at byggja bátadráttin í fíggjarárinum 2025, og skal tí støðast takast til hvussu játtanin skal veitast til fyriliggjandi fakturar, nú arbeiði er framt í inniverandi fíggjarári FÆ2026.

Avsett er á FÆ2026, §525 "stuðul til FSR" kr. 1,0 mió.

Mælt verður nevndini eisini til, at taka støðu til eigaraviðurskiftini av bátadráttinum, vísandi til samtyktina hjá vinnu og havnanevndini 14. oktober 2025.

**<u>Mentanarnevndin 10. juni 2026:</u>**
Forkv. mælir til, at veita stuðul til FSR av FÆ2026, §525 til bygging av bátadráttinum. -Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. juni 2026:**
Fíggjarnevndin samtykkir einmælt tilmælið hjá mentanarnevndini, um at veita FSR stuðul til bygging av bátadrátti, samv. Tilboð frá MTV- Byggivirki, og at hetta verður játta av FÆ2026, §525. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 10. juni 2026:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini um at veita FSR stuðul til bygging av bátadrátti, samv. tilboð frá MTV- Byggivirki, og at hetta verður játta av FÆ2026, §525.

Fundurin lokin kl. 17:40

Kristin Michelsen

Tóki Justinussen

Alvi Mortensen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Eyð Jóna Eidesgaard

Arnfinn Bech